


# Shipping næmingur

**Vit søkja eftir shipping næmingi at byrja í september 2021**

Útbúgvingin er ein 2 ára útbúgving í tveimum pørtum. Ástøðiligi parturin er undirvísing á Danish Shipping Academy, ið millum annað fevnir um maritiman búskap, sjórætt, samráðingarhættir og samskifti. Útbúgvingin gevur ikki ECTS stig. Til ber at lesa meira um útbúgvingina á: www.danishshippingacademy.dk

Verkligi parturin av útbúgvingini verður á okkara skrivstovu, har tú við eini breiðari upplæring millum annað kemur at arbeiða við sjórætti, myndugleika- og kunda krøvum, trygging, leigusáttmálum fyri skip og annað arbeiði í samband við reiðara virksemi.

**Um teg:**

- Tú hevur miðnámsprógv
- Tú hevur støddfrøði á B støði, ella samsvarandi førleikar
- Tú hevur lætt við at samskifta á føroyskum, enskum og skandinaviskum í skrift og talu
- Tú ert skipað/ur og trívist við skiftandi arbeiðsuppgávum
- Tú ert tænastusinnað/ur og hevur góð samstarvsevnir

**Vit bjóða:**

- Eina breiða upplæring við góðum møguleikum fyri fakligari -og persónligari menning
- Lærupláss í eini avbjóðandi og krevjandi arbeiðsmentan
- Spennandi og skiftandi arbeiðsuppgávur
- Løn undir útbúgving

**Setanarviðurskifti:**

Starvsbyrjan er í september 2021. Løn er sambært avtalu.

**Hevur hetta tín áhuga?**

Send okkum tína umsókn við CV og prógvum til: jobs@skansi.fo, freistin at søkja er 25. juni 2021.
Spurningar kunnu setast til Gunnvá Olsen, gunnva@skansi.fo ella á tlf 614900.

SKANSI OFFSHORE

SKANSAVEGUR 7
FO-100 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

T : +298 61 49 00
F : +298 31 49 06
E : SKANSI@SKANSI.FO